FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF FAROE ISLANDS

# Váttan um innskriving til útbúgving ella stakgreinir og til próvtøkur í øllum lærugreinum, ið innskrivingin fevnir um

| **Lesandi nr.** | | | |
|---|---|---|---|
| **Fornøvn:** | | | |
| **Eftirnavn:** | | | **Føðingardagur:** |
| **Bústaður:** | **Postnr.:** | **Bygd/býur:** | **Tlf. nr.:** |
| **Teldupost-bústaður:** | | | **Fartlf.nr.:** |

Deild: **Náttúruvísindadeildin**

Lestrarár: / - 201 - / - 201

Útbúgving ☐ / Stakgrein ☐ nr:__________ Heiti: ______________________________

***Fráboðan:***

☐ Eg boði við hesum frá, at eg ynski at nýta teldu til próvtøkurnar í omanfyristandandi útbúgving, har telda er loyvd, og góðtaki reglurnar hesum viðvíkjandi, (sí baksíðu).

☐ Eg ynski ikki at nýta teldu til próvtøkurnar í omanfyristandandi útbúgving.

______________________, hin / - 201 ______________________________
Staður Undirskrift

***Um studentur ikki møtir til próvtøku og ikki hevur meldað frá henni í seinasta lagi vikudagin undan próvtøkudegnum, verður viðkomandi skrásettur fyri eina fullgilduga próvtøkuroynd við próvtalinum 00.***

Deildar-/skúlaleiðslan váttar, at innskrivingin er góðkend.
Verður sent Setursskrivstovuni til skrásetingar.

______________________, hin / - 201 ______________________________
Staður Undirskrift

Poststaður
J. C. Svabos gøta 14
FO 100 Tórshavn

Bústaður
J. C. Svabos gøta 14
FO 100 Tórshavn

Heimasíða
www.setur.fo

T-postur
setur@setur.fo

Telefon
35 25 00

Faks
35 25 01

**Serstøk kunning til studentarnar um reglur fyri próvtøkuhald við teldu**

### Um studenturin sjálvur hevur teldu við (tá øll hjálpiamboð eru loyvd):

1. Studentar skulu koma á Náttúruvísindadeildina við egnari teldu, geyma og prentara (o.ø. sum er neyðugt fyri at teldan riggar: leidningar o.a.). Øll elektroniska útgerðin skal vera royndarkoyrd í góðari tíð, áðrenn próvtøkan byrjar.

2. Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av, at telduútgerðin riggar. Eingin teldukønur verður til staðar at hjálpa. Um so er, at trupulleikar stinga seg upp í telduútgerðini hjá tí einstaka, verður ikki longt um próvtøkutíðina, ei heldur verður møguleiki fyri endurprótøku. Studenturin skrivar tá víðari við hond og kann annars til eina og hvørja tíð byrja at skriva við hond heldur enn teldu.

3. Eigarin av teldu og prentara hevur sjálvur ábyrgd av, at ognin er tryggjað móti stuldri ella herverki, meðan ognin stendur á setrinum.

### Tá studentarnir ikki sjálvir hava teldu við:

4. Náttúruvísindadeildin í samráð við KT-tænastuna hevur ábyrgd av, at teldurnar virka, tá próvtøkan byrjar, at tær eru eins uppsettar, og at tað bert er atgongd til tilfar við teldunum, ið er góðkent sum hjálparamboð til próvtøkuna. Somuleiðis verður syrgt fyri, at atgongd er til prentara.

5. Studenturin hevur ábyrgd av at seta: Navn, studenta nummar, lærugreina nummar og dagfesting á próvtøkuskjalið, áðrenn próvtøkan byrjar. Um onnur forrit verða nýtt, har brævhøvd ikki er tøkt, skal navn setast á próvtøkuskjalið.

6. Studenturin undirskrivar eina fráboðan við fyrstu innskriving til útbúgvingina, um hann ynskir at nýta teldu til próvtøkurnar, har telda er loyvd.

7. Studenturin má bert nýta forrit og fílar, ið eru góðkend sum hjálpiamboð til próvtøkuna.

8. Tað er ikki loyvt studentinum á nakran hátt at senda upplýsingar millum teldurnar.

9. Undir próvtøkuhaldinum hevur studenturin sjálvur ábyrgd av, at svar og ávegis svar regluliga vera tøk undir próvtøkuni (td reglulig elektronisk goyming av skjølum), eins og studenturin hevur ábyrgd av, um útskrift er av svarunum. Forsøming av hesum, og um tøknin svíkur, gevur ikki studentinum rætt til endurprótøku.

10. Um streymslit er undir próvtøkuni, og teldurnar ikki hava battarí-backup, heldur próvtøkuhaldið fram uttan teldu. Kemur streymurin aftur, og teldurnar starta og virka sum tær eiga, kann teldan aftur nýtast sum hjálparamboð.

11. Tá próvtøkutíðin er farin, skal uppgávusvarið vera liðugt prentað og vera lagt í próvtøkuumslagið.

12. Tað er studenturin sjálvur, sum velur út tey ørk, ið skulu latast inn til døming. Øll útskrivað ørk skulu byrja við navninum á studentinum og hava dagfesting og síðunummar á. Undirskrift skal vera á seinasta arki. Geymi o.a. kann ikki nýtast sum kladda ella sum skjalprógv fyri, hvat møguliga skuldi verið latið inn.

13. Verða ásetingar í punktunum 7 ella 8 brotnar, verður tað roknað sum próvtøkusvik og studenturin verður burturvístur frá próvtøkuni.

**Samtykt av megindeildarráðnum fyri náttúruvísindi 2. juni 2006, og dagføring varð samtykt á fundi 10. desember 2007.**

| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |